Dagfesting: 11. juni 2021

J.nr. 21/00366-1

# Starvslýsing

## Starvsfólk til dagstovnin Kambur á Kambsdali

Fuglafjarðar kommuna søkir eftir námsfrøðingum til dagstovnin Kamb á Kambsdali, ið hava hegnið og dirvið at seta dagsskránna fyri 6 ára gomul børn og frítíðarskúlabørn, at byrja 9. august 2021.

### *Um dagstovnin Kamb*

*Kambur er dagstovnur, ið er staðsettur í náttúruvøkrum umhvørvi á Børkugøtu 2 á Kambsdali, og veitir heildags tilboð til 6 ára gomul børn og er frítíðarskúli fyri 1. og 2. flokk aftaná skúlatíð. Á Kambi arbeiða 8 fólk og tað er pláss fyri 60 børnum.*

Talan er um 4 størv við einum vikuligum tímatali á 40. Nakrir av hesum tímum, sum verða skipaðir í samstarvi við leiðaran og starvsfólkabólkin, eru at rokna sum stuðulstímar til børn við serligum tørvi. Broytingar í vikuligum tímatali kunnu møguliga gerast í samráði við leiðaran.



### Vit sóknast eftir starvsfólki:

- Sum tekur undir við okkara virðisgrundarlagi.
- Sum hevur umsorgan fyri tí einstaka barninum.
- Sum er álítandi, tekur ábyrgd og dugir at seta sær mál.
- Sum er jalig/ur og hevur hug og hegni at samstarva bæði við starvsfelagar, foreldur og børn.
- Sum sær møguleikar, ið náttúran hevur at bjóða og sum hevur hug og hegni at brúka hesar møguleikar í arbeiðinum.
- Sum dámar væl at luttaka í uttandura virksemi.

### Vit leggja dent á, at starvsfólkið:

- Virðir tað einstaka barnið.
- Møtir barninum, har tað er.
- Hevur hug og hegni at læra børnini gjøgnum spæl og at málmenna børnini.

- Hevur hug og hegni at skapa karmar, har børn kunnu brúka teirra hugflog og skapandi evnir bæði innandura og uttandura, úti í náttúruni.
- Hevur hug og hegni at skapa álit, trivnað og tryggleika bæði fyri børn og foreldur.
- Kemur við nýhugsan og ígongdsetan.
- Má tola møguligar broytingar i starvsinnihaldinum.

**Vit kunnu bjóða tær:**
Eitt spennandi starv, sum er í støðugari menning, har tú kanst vera við at mynda og seta tín dám á stovnin. Talan er um eitt starv við fjølbroyttum arbeiðsuppgávum og har tú kanst vísa tínar dygdir og samstundis menna teg sjálvan persónliga og fakliga. eru fjølbroyttar

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya (KAF)

Arbeiðstíðin er mánadag til fríggjadag í tíðsrúminum kl. 07:30 – 17:00.

Um eingin námsfrøðingur søkir, so verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað størv.

**Meira fæst at vita um størvini:**
Vilt tú vita meira um størvini og stovnin, kanst tú seta teg í samband við leiðaran á Kambi, Bjørghild Arnholdtsdóttir, telefon: 238092.

**Umsókn:**
Umsókn saman við prógvi, CV, revsiváttan og møguligum viðmæli/um, skal sendast til kommunuskrivstovuna, Í Støð 5, 530 Fuglafjørður, ella umvegis teldupost á info@fuglafjordur.fo Umsóknarfreistin er 30.juni 2021.